AMERIKATÚRUR 7. TIL 30. JUNI 2010

# THE LAND OF THE FREE

VIT GERÐA OKKUM **KLÁR**, VAKNA ALT OV **TÍÐLIGA** – HAVA **JETLAG** – OG ERU TÍSKIL **ÚTI AV KÓS** VIÐ OKKARA **INNARA** UR, OG HETTA KEMUR OKKUM **TILGÓÐAR** NÚ, TÍ VIT HAVA VUNNI **NAKRAR** TÍMAR



**2. PARTUR**

Albert Isfeld
post@sosialurin.fo

### Mikudagin 9. juni
***EIN BÝTÚRUR***

Leiðin gongur fyrst yvir á Seventh Avenue, har vit gera eitt legg inn á tað heimskenda stadion Madison Square Garden, sum verður brúkt til ymisk bóltspøl, boxing, Mohammed Ali hevur boxa her, og størri framførðslur av tónleiki við t.d Franh Sinatra og evangelisk møtir við t.d. Billy Graham – eitt sera nógv brúkt stadion.

Vit kundu hugsa okkum at sæð meira av stadion, vit høvdu bara sæð forhøllina v.m., og spurdu ein vaktarmann um hetta, hann segði, at aftaná kl. 2.30 var møguleiki at siggja alt stadion í einum guidaðum túri – aftur her ein sera kurtheisligur, fittur og prátingarsamur newyorkari. Vit avtalaðu aftur at koma til henda guidaða túr at síggja alt hetta stóra stadion.

Nakað longur uppi á Sevent Avenue liggur heimsins størsta vøruhús Macy`s og settu vit beina kós móti hesum so kenda vøruhúsi. Uttan er húsið ein stórur kolossur, ikki so flott sum ofta avmynda í bókum, og innan minti tað ikki sørt um tað nú burturblivna Daells Varehus í Keypmannahavn. Ein túrur runt í hesum húsi vísti seg at opinbera nøkur element frá stórheitstíðini hjá hesum húsi – millum annað eina rullutrappu úr fineraðum viði og lampur og gólváleggingar frá hesi tíð.




*Vøruhúsið Macy's*

Tað var fyrrverandi hvalafangarin Rowland Hussey Macy, sum grundlegdi Macy´s í einum lítlum handli í 1857, og seinni bleiv stóra vøruhúsi bygt í 1912, og stendur at kalla í sama skapi enn.

Aftaná fóru vit á Times Square har vit ótu á Planet Hollywood, sum kendir sjónleikarar, eitt nú Bruce Willis og aðrir eiga, og tað var áhugavert, tí har er hópur av klæðum og lutum, sum eru brúkt í filmum, heilt aftur til judy Garland.

Frá Macy´s gongur leiðin eftir West 42th Street yvirum Broadway, har vit longri niðri í gøtuni fáa eyga á Flatn Building í baksýn, og gera steðg við Bryant Park, ein park, sum fullkomiliga líkist einum av »the squeres« í London við teimum so eyðkendu smíðijarnsrekverkunum , ja so nógv at mann fekk kensluna av at vera í London.




*Madison Square Garden*

Víðari gongur leiðin yvirum Fifth Avenue til East 42th Street og gera steðg uttanfyri stóru Grand Central Terminal, sum kann sigast at vera høvuðsbanagarðurin hjá New York.




*Flatiron Building (ella Strýkijarnið)*

Grand Cetral Terminal er bygdur í 1913 og stílurin er Beaux Art, arkitektar eru Warren & Wetmore.

Bygningurin er uttan stórfingin á at lýta og er bygdur úr marmor sum